## LANDBÚNAÐARSTUDNINGUR

**Studningur til stráfóður**

Umsóknir um stráfóðurstudning skulu vera Búnaðarstovuni í hendi í seinasta lagi 6. oktober 2006. Uppteljingardagur er 2. oktober 2006. Studningur verður latin til egið framleitt stráfóður, sum verður brúkt í neytahaldinum - súrhoyggj í brunni ella rullubyrðu og hoyggj.

Bøndur, sum ikki hava fingið umsóknarblað sendandi, kunnu venda sær til Búnaðarstovuna ella taka umsóknarblaðið niður frá heimasíðuni.

Á umsóknarblaðnum er greitt frá um studningstreytirnar. Umsøkjarar skulu m.a. hava landbúnað sum vinnu, vera bókhaldsskyldugir og mvg-skrásettir.

Landbúnaðarstudningur verður veittur við heimild í løgtingslóg nr. 32/2003 og kunngerð nr. 96/2003.

**Annar landbúnaðarstudningur**

Við heimild í løgtingslóg nr. 32/2003 og kunngerð nr. 96/2003 verður studningur eisini veittur til framleiðslu av mjólk, neytakjøti og seyðakjøti og til súrhoysbrunnar, velting og føroysk húsdjór.

Nágreiniligari upplýsingar og umsóknarbløð fáast frá Búnaðarstovuni og á heimasíðu stovunar.

**BÚNAÐARSTOVAN**
Frammi í Dali 166 · 410 Kollafjørður
Tel 479000 · Fax 479020
bst@bst.fo · www.bst.fo

## Verkfrøðingur/ byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella starvsfólki við líknandi útbúgving ella royndum.

Førleiki at tekna við AutoCAD ella møguliga øðrum CAD forriti er ein fyritreyt. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan okkara virkisøki, sum er vatnveiting, kloakering og HVS-installatiónir.

**Martin E. Leo Sp/f**
Ráðgevandi verkfrøðingar · tlf. 311488 · fax 315488
Tórsgøta 24 · 110 Tórshavn · t-post: martin@mel.fo

Sosialurin -har tað hendir

## Pedagogur/ stuðulsfólk

Søkt verður eftir 1 stuðulsfólki á 20 tímar til barnagarðin í Leirvík, at byrjað 1.oktobur 2006 ella skjótast tilber.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður at menna barnið sosialt, málsligt og at strukturera gerandisdagin.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Stuðulin verður settur á barnagarðinum og sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðrit Gøthe, virkandi leiðara, á tlf. 443325 ella 743125.

Skrivlig umsókn við avritum av møguligum prógvum skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 29. september 2006 kl. 12.00.**

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

Merkt: Umsókn

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

## Sjúkrarøktar-frøðingar,

**heilsuatstøðingur ella røktari til Psyk. D4/5**

Á Psykiatriska deplinum D4/5 eru hesi størv leys at søkja til setan 1. november 2006.

- 2 sjúkrarøktarfrøðingar í blandaðum vaktum á fullari tíð við møguleika fyri niðursettari tíð.
- 1 heilsuatstøðingur ella røktari í náttarvakt á 0,5.

Nærri fæst at vita um størvini og deildina á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum, www.lsh.fo undir "størv", ella við at venda sær til deildarleiðaran Liss Jakobsen, tlf. 304500, lokal 4005, t-post LiJa@lsh.fo
ella leiðandi sjúkrarøktarafrøðing Bergit Weihe, tlf. 30 45 00, lokal 4102, t-post bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 10. oktober 2006 klokkan 12.00.

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

## Skúlin á Fossánesi

**Starv í Skúlanum á Fossánesi at byrja 16. oktober 2006.**

- Eitt starv 0,62, tað er avlopstímar, umleið 17 tímar um vikuna.

**Tann, ið settur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- Vera stundislig/ur og nærløgd/lagdur

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður í starv, skal hava lærara-útbúgving.

**Løn:**
Lønt verður sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. okt. 2006.

Fleiri upplýsingar um starvið fært tú við at venda tær til Poul Jacob Zachariassen, skúlaleiðara á tlf. 452120 ella 229418.

**Skúlin á Fossánesi**
730 Norðdepil
tlf. 452120 · ofax 452122
Teldupostur fos@skulin.fo
Heimasíða: www.skulin.fo/fos

Skúlin á Fossánesi hevur komandi skúlaár 48 næmingar, sum ganga í 1. til 7. flokk. Tað verða 5 lærarar og ein stuðul.
Skúlin er væl útgjørdur við bókum og amboðum. Sí annars heimasíðuna.

## Skrivstovufólk til Vágs kommunu

Vágs kommuna søkir eftir avloysara fyri skrivstovufólk í farloyvi at byrja 1. desember 2006.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving innan skrivstovuyrki.
- Royndir innan skrivstovuyrki.
- Aðrar viðkomandi royndir.
- Teldukønur.

**Setanartreytir:**
- Talan er um fulltíðarstarv.
- Starvið er lønt samsvarandi sáttmala millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petry Joensen tlf. 373024

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skal verða Vágs Kommunu í hendi í seinasta lagi 6. oktober 2006 kl. 12.00.

Umsóknin skal sendast til :

**Vágs kommuna**
FO-900 Vágur
Viðm.: Skrivstovufólk